## Claus bíðar

Claus Bech Jørgensen vil fegin aftur til Danmarkar at spæla, men hetta er ikki heilt so lætt í løtuni. Danska heimasíðan bold.dk skrivar, at leikaraumboðsmaðurin hjá Claus Bech Jørgensen fyri einum mánaði síðani boðaði frá, at teir vóru í samband við fleiri SAS-liga feløg, men síðani tá er ikki nógv hent. – Vit eru ikki komnir nærri eini avgerð enn, men tað er tí, at marknaðurin er soleiðis háttaður, sum hann er í løtuni, sigur Allan Reese, sum er leikaraumboðsmaður hjá Claus Bech Jørgensen. Hann sigur, at feløgini hava boðað teimum frá, at tey ynskja at síggja hvat hendir á marknaðinum, áðrenn tey taka nakra avgerð.



## Armstrong vísti styrkina

Liðkoyring í tíðarkoyring var í Tour de France í gjár, og tað var um reppið, at sjeyfaldi tour-vinnarin, Lance Armstrong, vann seg í gulu troyggjuna, sum hann ikki hevur verið í, síðani hann segði seg gevast á hjólhestinum. Tað avgerðina angraði hann tó í fjør, og síðani hevur málið verið at vinna Tour de France. Eitt mál, sum kanska slettis ikki er so fjart. Astana, sum er liðið hjá Armstrong, nýtti 46 minuttir og 29 sekund um tíðarkoyringina, og í longum pettum av teininum var tað júst Armstrong, sum setti ferðina hjá liðnum. Danska Team Saxo Bank, sum var á odda undan dagsins teini, nýtti 47 minuttir og 9 sekund, og tí stóð á jøvnum millum Armstrong og Cancellara. Men eftir at hava roknað nakrar ferðir umaftur, kom kappingarleiðslan á Tour´inum eftir, at Cancellara framvegis er 11/100 sekund á odda í kappingini.




Hjá 5-mannaførum við kvinnum er enn púrasta opið stríð í dystinum um FM-heitið
Savnsmynd

# Startrøðin á vestanstevnu

**Næst seinasta FM-stevnan á árinum verður í Sandavági leygardagin. Róðrarsambandið hevur nú boðað frá, hvussu startrøðin til ymsu róðrarnar verður. Byrjað verður klokkan 13 við barnaróðrinum, og klokkan 15 verður sum vant farið undir FM-róðrarnar.**

**Barnaróður, gentur, bólkur 1**
4 Royndin Fríða
5 Svanur
6 Tekla
7 Blikur
8 Spógvin
9 Ørnin
10 Jallurin
11 Bylgjan
12 Firvaldur
13 Tambar

**Barnaróður, gentur, bólkur 2**
4 Ritan
5 Tjaldrið
6 Sílið
7 Títlingur
8 Frúgvin
9 Teistin
10 Kollur
11 Fípan Fagra
12 Dúgvan
13 Drekin

**Barnaróður, dreingir**
3 ípan Fagra
4 Bylgjan
5 Kollur
6 Frúgvin
7 Drekin
8 Títlingur
9 Jallurin
10 Junkarin
11 Svanur
12 Tambar (1G)
13 Havfrúgvin
14 Teistin (1G)

**5-mannafør, gentur**
6 Junkarin
7 Hvassi
8 Jallurin
9 Firvaldur
10 Sílið (2G)
11 Havfrúgvin
12 Falkur

**6-mannafør, kvinnur**
6 Romvlvs
7 Jarnbardur
8 Páll Fangi (1G)
9 Gongurólvur
10 Sølmundur
11 Hvessingur

**5-mannafør, kvinnur**
6 Katla
7 Hvassi
8 Frúgvin
9 Erla Kongsdóttir
10 Ritan
11 Blikur

**6-mannafør, menn**
5 Strálan
6 Smyril
7 Gongurálvur
8 Riddarin
9 Tvørabáturin
10 Riddarin
11 Sundabáturin
12 Skúgvur
13 Hósvíkingur

**5-mannafør, dreingir**
4 Firvaldur
5 Ritan
6 Kollur
7 Teistin
8 Blikur (1G)
9 Tjaldrið
10 Royndin Fríða
11 Báran
12 Sílið
13 Junkarin

**8-mannafør**
7 Knørrur
8 Árnfirðingur
9 Argjabáturin
10 Ørvur
11 Nevið Reyða

**10-mannafør**
8 Eysturoyingur
9 Klaksvíkingur
10 Ormurin Langi RK

**FM-kappróður**

| | | Stig íalt | Varmakelda |
|---|---|---|---|
| | **5-mannafør, dreingir** | | |
| 1 | Tjaldrið | 35 | 7 |
| 2 | Blikur | 26 | 6 |
| 3 | Teistin | 18 | 4 |
| 4 | Junkarin | 18 | 0 |
| 5 | Royndin Fríða | 16 | 5 |
| 7 | Báran | 14 | 3 |
| 8 | Kollur | 8 | 2 |
| 9 | Havfrúgvin | 3 | 0 |
| 10 | Sílið | 1 | 1 |
| 11 | Jallurin | 1 | 0 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Gongurólvur | 35 | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 29 | 6 |
| 3 | Sølmundur | 25 | 5 |
| 4 | Jarnbardur | 20 | 4 |
| 5 | Hvessingur | 16 | 3 |
| 6 | Romvlvs | 10 | 2 |
| | **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 | Firvaldur | 31 | 7 |
| 2 | Jallurin | 31 | 6 |
| 3 | Sílið | 22 | 5 |
| 4 | Hvassi | 17 | 4 |
| 5 | Havfrúgvin | 14 | 3 |
| 6 | Falkur | 10 | 1 |
| 7 | Báran | 7 | 0 |
| 8 | Junkarin | 3 | 2 |
| 9 | Kollur | 3 | 0 |
| 10 | Katla | 1 | 0 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Erla Kongsdóttir | 33 | 7 |
| 2 | Frúgvin | 32 | 6 |
| 3 | Hvassi | 23 | 4 |
| 4 | Ritan | 22 | 5 |
| 5 | Blikur | 15 | 3 |
| | **6-mannafør, menn** | | |
| 1 | Riddarin | 33 | 6 |
| 2 | Tvørabáturin | 32 | 7 |
| 3 | Smyril | 20 | 2 |
| 4 | Sundabáturin | 19 | 5 |
| 5 | Gongurólvur | 16 | 4 |
| 6 | Skúgvur | 11 | 1 |
| 7 | Rádni | 8 | 3 |
| 8 | Jarnbardur | 1 | 0 |
| | **8-mannafør** | | |
| 1 | Argjabáturin | 35 | 7 |
| 2 | Ørvur | 26 | 5 |
| 3 | Árnfirðingur | 24 | 6 |
| 4 | Knørrur | 20 | 3 |
| | **10-mannafør** | | |
| 1 | Klaksvíkingur | 33 | 7 |
| 2 | Eysturoyingur | 32 | 6 |
| 3 | Havnarbáturin | 25 | 5 |